Størv í Føroya Banka




**Nýskapan og menning eru lyklaorðini til vøkstur, eisini í bankaheiminum. Tað hava vit ásannað og hava tí valt at stovna eina nýggja deild til endamálið. Vit vilja tí savna eitt gott toymi av framfýsnum starvsfólkum at manna deildina. Í hesum sambandi lýsa vit eftir einum verkætlanarfólki og einum samskiftisfólki.**

**Verkætlanarfólk**
Hevur tú visjónir fyri, hvussu bankin kann mennast og mót upp á at fremja hesar í verki, er tað kanska júst tær, ið vit leita eftir. Tú skalt kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstundis vera góður viðleikari í toyminum. Kreativitetur verður settur í hásæti.

**Førleikakrøv**
Tú hevur hóskandi útbúgving frá hægri lærustovni ella tilsvarandi arbeiðsroyndir. Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir við verkætlanarleiðslu. Royndir frá fíggjarheiminum telja eisini, men eru tó ikki nakað krav. Kunnleiki til mest vanligu telduforritini sum MS Office er eitt krav. Tú skalt klára teg væl á enskum máli, bæði í skrift og talu.

**Samskiftisfólk**
Storytelling, branding, virkismentan og mennandi samskifti eru natúrligir partar av eini fyritøku í menning. Hevur tú førleikarnar og persónligu eginleikarnar til at standa fyri hesum týdningarmiklu uppgávum, hava vit eitt sera avbjóðandi starv at bjóða tær.

**Førleikakrøv**
Tú hevur hóskandi útbúgving sum journalistur ella líknandi. Somuleiðis er tað eitt krav, at tú hevur drúgvar royndir frá miðlaheiminum. Leiðsluroyndir eru ein fyrimunur.

**Løn og setanarviðurskiftir**
Verða avtala nærri samsvarandi útbúgving og royndum.

**Umsókn**
Send tína umsókn við CV til:
Føroya Banki, Húsagøta 3, FO-100 Tórshavn,
att: Bjarki Mohr, ella á teldupost **starvsfolk@foroyabanki.fo**
innan mánadagin 21. november 2005.

Spurningar um størvini kunnu setast Johnny í Grótinum, leiðara fyri Menning & Samskifti, á tlf 311350 ella teldupost **johnny.igrotinum@foroyabanki.fo**, ella Bjarka Mohr, starvsfólkaleiðara á tlf 319937 ella teldupost **bjarki.mohr@foroyabanki.fo**.

FØROYA BANKI
www.foroyabanki.fo




# Jólakalendari

Seinastu dagarnar hava fólk gingið kring oyggjarnar og selt jólakalendarar fyri Deyvafelag Føroyar.

Aftur í ár er tað Hermundur Zachariassen, sum hevur teknað jólakalendararn. Ágóðin fer til »Deyvafelag Føroya« og »Grunn Teirra Deyvu«.

Jólakalendarin kostar 50 krónur, og er ein lutaseðil við gávukortum sum vinningar.

Vit trekkja tríggjar ferðir í desember, siga tey frá Deyvafelagnum: 1. desember, 5. desember og 12. desember.

Kunngjørt verður í bløðunum, hvørjir hepnu vinnararnir verða.

Peningurin, sum kemur inn við sølu av jólakalendaranum og við innsavnan av girokortum á posthúsinum, er avgerandi fyri trivnaðartiltøkini, sum Deyvafelagið stílar fyri.

Tí vóna vit líka góða undirtøku eins og undanfarin og takka hjartaliga fyri góðan stuðul, siga tey frá Deyvafelag Føroya.




NÚ KEMUR
... greið tala!
Kánus

Hósdagin 17. november kemur Kánus í handlarnar.

Stuttligasta spurningaspælið, sum er komið á føroyskum.
Undirhald og spenningur við spurningum um alla ta vitan, sum goymir seg í okkara dagliga máli.

Statt ikki sum Kánus, men keyp spælið nú!
Kánus fæst í hesum handlum:

550,- kr.

SISERO 351800

Keypssamtøkurnar kring landið
Bókasølan og Griffilin í SMS
BR Leikur
Thomas Dam á Hálsi
H. N. Jacobsens Bókhandil
Hjalmar Jacobsens Bókhandil

Leikalund, Klaksvík
Alfa Bókhandli, Klaksvík
Leikabúðin, Saltangará
Fa. Ellen Dahl, Vágur
Karl Jespersen, Tvøroyri

ATLANTIC AIRWAYS  www.fk.fo  REYNI SERVICE  SKIPAFELAGIÐ